# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt er fyri neyðini

Í einum heimi, sum tykist yvirtikin av yvirgangi og hóttanum frá sera víðgongdum átrúnaðarligum bólkum og rørslum, gerst alt meira greitt, at trupulleikin verður ikki loystur við vápnamegi. Røturnar til yvirgang eru mentanarligar og sosialar t.e. útstoyting, fátækdømi og kúgan. Hetta vil við øðrum orðum siga, at yvirgangur fyrst og fremst er ein politiskur trupulleiki og ein slíkur trupulleiki kann sum kunnugt bert beinast burtur við politiskum loysnum.

Alt fleiri vanlig fólk eins væl og statsleiðarar eru farin at gera vart við, at strategiin í stríðnum móti yvirgangi er í besta føri nyttuleys og í versta føri beinleiðis skaðilig. Støðan í Irak og í Afghanistan bert versnar og stríðið móti yvirganginum, sum verður rikið har gongur hart út yvir sivilfólkið. Besta prógvið um hetta er, at bert í Irak eru 3 milliónir fólk flýdd undan ófriði og yvirgangi. Afturat hesum kemur, at nyttuleysa stríðið kostar hópi av vesturlendskum ungdómi lívið. Her er eitt fyri neyðini, sum skrivað stendur, tað er dialogur – eitt opið og fordómsfrítt orðaskifti millum vesturheimin og islamska heimin. Fundamentalisman breiðir seg nú frá Afghanistan. til Pakistan. Pakistan er eitt sera gott dømi um, at ein politiskur trupulleiki ikki kann loysast við hermegi. USA hevur borið pakistanska stjórnina í vápnum, meðan ófriðurin veksur og fundamentalistisku kreftirnar bert vaksa í megi og undirtøku fyri hvønn dag, ið fer.

Hesin dialogur má og skal byrja nú. Men tíverri er ikki nógv, sum bendir á, at vesturheimsins mætastu oddamenn eru sinnaðir at taka tann neyðuga dialogin upp við Islam. Nógv høvdu sett sítt álit á Gordon Brrown, men hann tyksit ikki vera maðurin, sum ger hol í sjógvin. Tvørturímóti hevur hann endurtikið allan retorikkin hjá Blair og tykist eins lýðin móti USA sum undanmaðurin. Tíðin vil visa, um vit mistaka okkum. Her er bert sostatt ein vón, og hon er, at USA fær eina nýggja politiska leiðslu á næsta forsetavali, sum verður um gott eitt ár – eina leiðslu, sum er sterk nokk til at taka upp tann neyðuga dialogin við islamska heimin. Eydnast hetta ikki fer tann triðja megin, Kina, avstað við heimsvaldinum og Vesturheimurin eins væl og islamski heimurin gerast við sviðið soð.

**Sosialurin**

## Rhodos, gull og pínligi Høgni

JOHAN SAMUELSEN



Føroysku ítróttarfólkini á Oyggjaleikunum á Rhodos hava vissuliga gjørt Føroyum æru og sóma úti í heimi – og hjartaliga tillukku við øllum teimum frálíku ítróttarúrslitunum, sum tit fingu í Oyggjaleikahøpi - og vit onnur gleðast og eru stolt tykkara vegna. Og vælheimafturkomin.

Men umframt at greiða frá ítróttarhendingunum á Rhodos, so helt Dimmalætting seg hava fatur í eini góðari søgu, um flaggølu á Rhodos við stórari mynd av niðurgjørda merki okkara hangandi á somu flaggstong niðriundir Dannebrog, júst tá leikirnir vóru um at byrja. Hesi “tíðindi” blivu enntá viðgjørd, sum sera seriøst mál, og greitt varð lesarum blaðsins frá, at hesi harraboð vóru komin frá sjálvari donsku sendistovuni í Athen, at so skuldi verða! Hesi ørkymlandi tíðindi vóru alt fyri eitt uppafturtikin her heima í øllum landsins fjølmiðlum, sum tann vissi sannleiki!

Og Høgni Hoydal var ikki seinur á sjóvarfallinum. Hann fór beinanvegin í fjølmiðlarnar, honum so líkt, at harmast um hendingina á Rohdos, og tosaði um samleika føroyinga, sum var hóttur av hesi donsku “beistagerð”, samstundis sum hann vísti á, at nú var próvfast og sjónligt fyri øllum, hvussu uttanríkisheimildarlógin h já Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, endaliga hevði forkomið øllum føroyskum rættindum uttanlands við hasi svaduni um “Kongeriget Danmark forsåvidt angår Færøerne”, so har var onki annað úrslit at vænta....

So nú var at smíða, meðan jarnið var heitt – ein flagggøla er altíð góð bót í nationalu súpanina hjá honum, nú annars er ógvuliga soltið í allar aðrar mátar politiskt hjá Høgna, og hann legðist ikki á boðini! Høgni fór heilt í sjálvsving, hann setti málið upp á tindarnar, fyrst harmasøgan í luftbornu fjølmiðlunum, so lesarabræv um løgmann, sum ikki hevði mótmælt á Rhodos o.s.fr. – og so onki minni enn ein fyrispurningur á fólkatingi til sjálvan uttanríkisráðharran, Per Stig Møller, um hesa donsku “valdsmisnýtslu”, og finnast skuldi fram til, hvør var komin við harraboðunum haðani um flaggingina undir leikunum á Rhodos!

**Roykur og ongin grind!**

Málið varð kannað av løgmansskrivstovuni, og sligið var alt fyri eitt fast, m.a. av skilamanninum Árna Olafson, at ongi boð um løgnu flaggingina á Rhodos vóru komin frá nakrari ráðharrastovu úr Keypmannahavn og enn minni frá uttanríkisráðharranum sjálvum! Og heldur ongi boð vóru givin av ambassaduni í Athen ella danska konslinum á Rhodos hesum viðvíkjandi til hotellið, sum flaggaði við Dannebrog og Merkinum undir hvørjum øðrum! Og niðurstøðan í hesum “harmammáli, sum hótti samleika føroyinga”, sambært Høgna Hoydal, er hon, at alt málið sum tað er , er ein stór misskiljing! Ein hotellstjóri, sum als onki kennir til stjórnmálaviðurskifti okkara og hvaðna minni til hina, “forsåvidt angår Færøerne”, hevði av sínum eintingum hongt tvey fløgg upp á somu stong! Og Dimmalætting skoytir uppí, at hann gjørdi hetta eftir boðum úr Keypmannahavn! Ein beinleiðis lygn, sum enn hongur í luftini, tí Dimma eins og hinir vælmannaðu føroysku fjølmiðlarnir á Rhodos syndaðu móti eini tí mest grundleggjandi fyritreytini fyri objektivum journalistiskum arbeiði, nevniliga at spyrja báðar partarnar í einum máli – í hesum førinum bæði ein lítið vitandi hotellstjóra, sum bjargaði sær í land við eini neyðlygn, øðrumegin, og sjálvandi donsku uttanríkistænastuna, umvegis løgmansskrivstovuna, hinum egin, fyri at lýsa tað á ein nøktandi hátt – hetta er barnalærdómur journalistanna! So var nevniliga onki mál og harvið ongin sonevnd flagggøla! Ein kann spyrja, um henda flagggøla er eitt slag av bestiltum arbeiði fyri ávísan flokk, sum bleiv avdúkað, sum tað reina gass og við absolutt null substansi í? Í hvussu so er, skjótt varð borið at, eftir at flaggmyndin av Rhodos var komin í Dimmu, sum kom í hæddina við fyrispurningi til Per Stig Møller uttanríkisráðharra. Og restina av søguni kenna vit...

Hetta mál vísir einaferð enn , tíverri, hvussu stutt á leið vit eru komin, tá talan er um seriøst journalistiskt arbeiði í Føroyum. Tað vantar nógv í, at blaðfólkini á Dimmu fáa gull fyri sítt arbeiði! Og mær vitandi hevur ongin enn tikið orðini aftur í seg og beinleiðis viðgingið, at hetta mál hevði onki við heimildarlógir ella donsk harraboð at gera, ússaligt! Og at Høgni Hoydal, í politiskum hjálparloysi, loypir so beint á bláman, sum ein onnur eltibløra, er verunliga at undrast á!?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.